Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Einki avgjørt enn

Mynd: Álvur Haraldsen

Tá teir 60 minuttirnir vóru leiktir, hevåi StÍF ein seinasta møguleika at avgera dystin, og John tók av hesum møguleika
Mynd: Álvur Haraldsen

Vi› einum beinlei›is 3-metra kasti, eftir at klokkan var farin um teir 30 minuttirnar , sendi John Petersen avgerandi bóltin í neistamáli›. Sostatt megna›u strandingar vi› einum skerdum li›i at halda lív í vónunum um finaluplássi›

JÁKUP MØRK

StÍF-Neistin 28-27 (15-13)

Fortreytirnar hjá strandingum undan dystinum vóru tó alt anna› enn gó›ar. Leikandi venjarin, Jónleif Sólsker, var ikki so leikandi, orsaka› av einum ska›a í knænum. Harumframt hevur Alexandur havt trupulleikar vi› knænum, bró›urin, Artur hev›i ilt í ryggginum, umframt at Marius Joensen hev›i ligi› sjúkur í nakrar dagar. Teir tríggir seinast nevndu vóru tó allir á vøllinum, tá dysturin mikukvøldi› var› blástur í gongd.

Neistali›i› var eisini eitt sindur skert, vi› ta› at Finnur Hansson er millum teirra, sum í løtuni liggja í seingini vi› krími.

Skiftandi stø›ur

Fyrstu løtuna var tó líkt til, at skerda StÍF li›i› einki skuldi formáa sær. Neistamenninir byrja›u sum eitt óløgi, og eftir lítlari løtu høvdu teir vunni› sær eina fimm mála stóra lei›slu.

Jónleif Sólsker á StÍF beinkinum hev›i eisini grøna korti› frammi, so hann kundi fáa nøkur or› á sínar menn, men hetta gjørdist tó ongantí› ney›ugt, tí brádliga fann heimali›i stevi› aftur.

Hetta var tó vi› gó›ari hjálp frá gestunum, sum brádliga byrja›u at gera nakrar fullkomuliga ómotivera›ar villur, hálvhjarta›ar skotroyndir og nøla›u í álop›sspælinum. So vi› og vi› fekk StÍF fatur á neistali›num, og eftir 8 minuttum, var stø›an broytt frá 2-7 til 8-8.

Neistin kom nú naka› meira vi› aftur í spæli›, men kortini vóru ta› strandingar, sum framhaldandi st‡rdu spælinum, og tá fari› var› til hálvleiks, høvdu teir vunni› sær eina tvey mála lei›slu.

Eitt, sum tó tykist undrunarvert er, at hóast Neistin fullkomuliga misti tamarhaldi› a dystinum seinna partin av hálvleikinum, so var› eingin roynd gjørd frá beinkinum um at bøta um spæli›. Bæ›i álop og verja spældu ví›ari í óbroyttum líki, og neistaleikararnir vóru fullkomuliga rá›aleysir hesa løtuna.

Gjørdist spennandi

Í seinna hálvleikivar tó meira skil komi› á neistali›i›, og nú fylgdust li›ini rættuliga væl. Neistin vann sær skjótt eina tvey mála lei›slu, men heimali›i›i svara›ir beinanvegin aftur, og eftir hetta var onganti› meira enn eitt mál millum partarnar.

Um mi›jan seinna hálvleik noyddist Artur út á beinkin eina løtu at hvíla seg, men hóast henda stóra miss, so megna›u strandingar alla tí›ina at fylgja gestunum.

Ein stóran part av hei›rinum fyri hesum, átti Johan í málinum, vi› ta› at hann hev›i fleiri gó›ar bjargingar hesa løtuna, serliga tá Kári nakrar fer›ir var› leiktur fríur í høgra bor›i. Tá tveir minuttir vóru eftir at leika, var líkt til, at dysturin skuldi taka eina avgerandi vend. Áki Olsen var› tá vístur út, vi› ta› at hann hev›i toga› í bringuna hjá John, tá hesin leyp upp í skotroynd, og neistamenn máttu nú leika restina av dystinum vi› einum leikara í minniluta›.

Kanska var útvísingin naka› hart dømd, men hóast hetta, so megna›u neistamenn enn einafer› at javna› til 27-27, men strandingar høvdu framvegis gó›an hálvan minutt til at skjóta avgerandi máli›.

Álopi› vardi tó naka› leingi, og tá tí›in var farin, stó› framvegis á jøvnum. StÍF átti tó eitt tríggja metra kast, og vi› gó›ari hjálp frá verjumúrinum hjá neistanum, sum stó› fullkomuliga skeivt plasera›ur, megna›i John at skjóta sítt 12. mál í dystinum, og á tann hátt tryggja heimali›num sigurin.

Hvat nú?

Li›ini bæ›i skulu nú bí›a í nakrar vikur, á›renn tey endaliga kunnu gera av, hvørt av teimum skal leika steypafinaluna móti Kyndli ella VÍF, og hóast strandingar nú hava fyrsta settbóltin, so eru útlit fyri, at vit fáa ein sera spennandi dyst, tá li›ini bæ›i tørna saman í Havn hin 26. í hesum måna›inum.

Strandingar ver›a tá helst betri fyri, hvat vi›víkur fólki, men samstundis hevur Neistin eisini til ta tí› havt betri stundir at arbei›a vi› spæli sínum.

Ta› er nevnliga solei›is, at neistali›num í stóran mun tørvar alternativar loysnir til álopsspæli›, sum í alt ov stóran mun koyrir upp á at spæla bakkarnar upp til skot.

Tá strandingar fingu vart fyri hesum, megna›u li›felagarnir hjá Heina og Áka í alt ov lítlan mun at mynda spæli›, og hetta kann koma at kosta í seinasta enda, tí øllum kunnugt, so er hondbóltur eitt li›spæl. Sjálvsagt er ta› ein stórur fyrimunur at hava gó›ar einstaklingar, men hinvegin eigur li›i› eisini at hava a›rar møguleikar.

Hetta hev›i StÍF li›i› mikukvøldi›. Gaman í, so skeyt John 12 mál, men ta› vísti seg fleiri fer›ir í dystinum, at um ov stórur dentur var› lagdur á verja fyri honum, so kosta›i hetta kortini, vi› ta› at Artur, Marius og Alexandur allir kunnu bróta ígjøgnum, um teir fáa pláss til tess.

Hvussu er og ikki, so ver›ur ta› í øllum førum spennandi, tá StÍF kemur til Havnar um tvær vikur.

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:

STÍF:
John Petersen 12 (4), Sveinbjørn Poulsen 4, Marius Joensen 4, Kartin Danielsen 4, Alexandur Johansen 2, Artur Johansen 2

Neistin:
Heini Joensen 9 (2), Áki Olsen 8 (1), Kári Mortensen 3, Elmar Ósá 3, Áki Mørk 3, Karl O. Rasmussen 1

Brotskøst:
StÍF 4, Neistin 3

Útvísingar:
Neistin 5

Dómarar úr Kyndil:
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

Mynd: Álvur Haraldsen

Áki Mørk roynir her at bróta ígjøgnum strandaverjuna. Alt ov ofta var› álopsspæli› tó liti› upp í hendurnar i Heina Joensen og Áka Olsen

Spennandi hálvfinala í Vestmanna

Mynd: Jens Kr. Vang

Fyri fyrstu fer› í ár vóru Bjarni Wardum og hinir kyndilsmenninir omaná móti vestmenningum

Kyndil vann fyrru hálvfinaluna móti VÍF í steypakappingin i hjá monunum mikukvøldi›. Talan gjørdist enn einafer› um ein sannan klassikara

JÁKUP BOGI JOENSEN

VÍF-Kyndil 24-25 (10-13)

Fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini hjá monnunum vóru leiktar mikukvøldi›. í Vestmanna tók VÍF móti Kyndli, og talan gjørdist enn einafer› um ein sannan klassikara. Hóast Kyndil eitt skifti› var framman fyri vi› heili fimm málum, so eydna›ist ta› teimum grønu úr Havn, bert at vinna vi› einum máli. Vestmenningar eru tiltiknir sei›ir, og enn einafer› noyddist mótstø›uli›i› at ásanna, at eitt li› sum VÍF onganti› skal undirmetast. Heldur ikki tá munurin er uppá fimm mál.

Hjá Kyndli hava hálvfinalurnar í steypakappingini ógvuliga nógv at t‡›a. Møguleikarnir í kappingini um FM-heiti› fingu eitt ordans skot fyri bógvin, tá Kyndil sunnudagin tapti móti Neistanum í Havn. Skal Kyndil gera ein vørr í ár, skal ta› helst ver›a í steypakappingni. Vestmenningar teljast hinvegin millum favorittarnar í kappingini um FM-heiti› og nú tevjar sigursvanda VÍF li›i› av álvara gull í steypakappingin vi›. Men mótstø›an var hør› mikukvøldi›. Talan var jú um sí›sta útkall hjá Kyndli, og ta› eydna›ist eisini Kyndli at vinna dystin tepurt vi› einum máli. Endaliga úrsliti› av tí annars sera spennandi dystinum í Vestmanna mikukvøldi› gjørdist tí, at Kyndil vann vi› 25 málum móti teimum 24 hjá VÍF. Lagt er tí upp til ein sera spennandi dyst, tá seinna hálvfinalan ver›ur leikt í Havn um knappar fjúrtan dagar.

Kyndil hev›i munin

Hjá Kyndli var dysturin av sera stórum t‡dningi. Og ta› var eisini Kyndil, sum setti seg á dystin frá byrjan. Teir virka›u rættiliga uppsettir, og bardust allir sum ein fyri sakini. Serliga í verjupartinum bitu Kyndilsmenn frá sær, og førdi hetta vi› sær, at Vestmenningar als ikki fingu gli› á sítt spæl sum ætla›. Spæli› hjá Kyndli virka›i nógv betur skipa› enn hjá VÍF. Alt grunda› á gott verjuspæl, og tá álopsparturin eisini fór at rigga, sá út til, at Kyndil av álvara fór at ver›a ein møtimikil uppgáva hjá VÍF. Serliga hugaligt var í fyrra hálvleiki at síggja Íslendingin, Jacob Jónsson, s‡na fram kynstur vi› rundu le›urkúluni. Tó gjørdi Hans Áki Dal Christiansen mest um seg vi› fleiri frálíkum málum úr spískum vinkli. Hjá VÍF rigga›i ikki alt sum ta› skuldi í fyrra hálvleiki, men tó var Ingi Olsen ein sonn fragd at sko›a. Ingi er jú vi› sínum fantasktiska eyga fyri spælinum ein av okkara allar bestu leikarum. Kyndil hev›i munin allan dystin, og alla tí›ini vóru ta› Vestmenningar, sum skuldu vinna lei›sluna innaftur. Munurin var ofta stórur. Tvey, tr‡ mál skiltu partarnar, men tá 17 minuttir vóru leiktir, eydna›ist ta› VÍF at javna til 7-7. Men so settu Kyndilsmenn fer›ina upp, og so gekk ta› skjótt fyri seg. Og tá fyrri hálvleikur var› bríksla›ur av, vísti máltalvan 13-10 til Kyndil.

Spenningurin kykna›i av n‡ggjum

Fyrri hálvleikur gjørdist ikki ta› fólk høvdu vænta. Og kanska vóru fólk, kanska serliga Vestmenningar, bilsnir av, at Kyndil var á odda vi› trimum málum. Men eftir ste›gin kom meira fer› á VÍF. Ta› tók sína tí›, men teir komu sum eitt ódnarve›ur. Ikki tí. Kyndil var eitt skifti í seinna hálvleiki framman fyri vi› f‡ra málum, men spæli› hjá Havnarmonnum dovna›i alt meira burtur. Alt me›an Ingi Olsen, og kanska serliga Sámal Joensen funnu stórspæli› fram. Kyndil gjørdi mi›skei›is í seinna hálvleiki av at mansverja Inga, men so fóru a›rir at gera um seg. VÍF tók seg spakuliga men trygt inn á Kyndil, og tá i› knappir 19 minuttir vóru leiktir, vísti máltavan í Vestmanna, at Kyndil var á odda vi› tveimum málum. Stø›an var tá 20-18. Venjarin hjá Kyndli, Sophus Dal Christiansen, valdi at taka eitt time out, tá spælt var í smáar 20 minuttir. Hvat hann akkurát hevur sagt vi› sínar leikarar veit bla›ma›urin ikki, men eftir hetta hoyrdi tú ofta Kyndilsleikarar rópa millum sín, at vit koyra eitt langt álop. Lagt var vi› ø›rum or›um meira varliga fyri. Kanska var hetta betur ógjørt, tí ta› var júst teir seinastu tíggju minuttirnar, at VÍF av álvara hála›i seg inn á Kyndil. Sámal Joensen minka›i um munin vi› brotskasti til stø›una 25-23, tá klokkan í høllini vísti, at spælt var í 29 minuttir. Og í allar seinastu sekundunum minka›i munurin ni›ur í bert eitt mál, so at endaliga úrsliti› gjørdist ein 25-24 sigur til Kyndil. Onki er tí avgjørt undan seinnu hálvfinaluni í Havn um knappar fjúrtan dagar, og spennandi ver›ur at síggja, um tvey av mest vinnandi feløgum í landinum, tá enn einafer› fara at geva okkum ein spennandi dyst.

Gullkonto Cup 2000

Seinasta vikuskifti skipa›i Mjølnir fyri kapping fyri eldri li›ini, og um gó›a viku standa tey yngru fyri tørni

JÁKUP MØRK

Sum kunnugt, so var flogbóltur leiktur í allari Klaksvíkini seinasta vikuskifti, tá vaksnu leikararnir í landinum, høvdu høvi at royna síni flogbóltsevni, umframt at teir eisini fingu høvi at vera saman uttan fyri vøllin.

Ta› eru tó ikki bara tey vaksnu, sum sleppa at spæla flogbólt í Klaksvík, og leygardagin 23. januar ver›ur so stór kapping fyri yngru deildirnar hildin.

Vanliga hevur undirtøkan til hesa kapping veri› sera gó›, og væntandi ver›ur hon ikki minni hesu fer›ina.

Ta› er nevnliga solei›is, at í ár er ein n‡ggjur aldursbólkur komin vi› í flogbóltshøpi, og er hetta bólkurin upp til 9 ár. Frammanundan hevur yngsti bólkurin veri› fyri gentur og dreingir upp til 12 ár, so møguliga kann flogbólturin fáa fatur á enn fleiri leikarum á henda hátt. Í hvussu so er, kann hetta ver›a vi›virkandi til at áhugin fyri flogbóltinum ver›ur kveiktur fyrr, so at tey yngstu eisini kunnu fáa gle›i av hesi ítróttargrein.

Kappingin fer sostatt at fevna um fimm aldursbólkar, og ver›ur kappast hjá bá›um kynum í hesum bólkum.

Úr Klaksvík frætta vit, at væntandi fer tali› av li›um at liggja um tey 70, men kortini er ætlanin at avgrei›a allar dystirnar leygardagin, vi› ta› at dystir ver›a leiktir í landskappingini sunnudagin.

Sjálvsagt ver›ur tí ney›ugt vi› fleiri hallum, men hetta man ivaleyst fara at ganga. Vanligt hevur veri›, at tey hava n‡tt KÍ-høllina, fimleikahøllina og skúlan á Fossanesi til hesar kappingar, men um heilt illa stendur til, er møguleiki eisini fyri at leiga høllina á Vi›arei›i. Hesin møguleiki hevur tó ikki veri› n‡ttur enn, men ver›ur undirtøkan nóg stór, gerst hetta kanska ney›ugt.

Kappingin er annars skipa› solei›is, at teljiskipanin ver›ur hin sonevnda »running-scores«, sum nú eisini ver›ur n‡tt í landskappingini. Leikt ver›ur upp til 21 í hvørjum setti og stendur á jøvnum eftir tey bæ›i fyrstu settini, skal dysturin avgerast vi› einum tie-breakara.

Eftir at seinastu dystirnir eru leiktir, letur Nor›oya Sparikassi steyp og hei›ursmerki til vinnandi li›ini.